90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos

# BOGI ANDREASEN

FAKTA **BOGI**

**Navn:** Bogi Andreasen
**Aldur:** 37 ár
**Bústaður:** Havn
**Starv:** Leiðari á Margarinfabrikkini
**Familja:** Konu og tvey børn



# Eg eri altíð í góðum lag

**Hvussu er lagið?**
Eg eri altíð í góðum lag. Eg havi positivt lyndi.

**Hvat er tú mest – leiðari í Margarinfabrikkini ella varaborgarstjóri í Havn?**
Eg eri fultíðarsettur í Margarinfabrikkini og partíðarpolitikari. Eg eri nógv úti, so tað er gott, at eg havi eina tolna og góða konu.

**Hevur tú nógv vald?**
Eg havi nógva ávirkan har eg eri

## Hvussu er at arbeiða við tannáringum?

Tað er ótrúliga positivt og lívsjáttandi. Man veit veruliga, hvussu tey hava tað. Tað er onki »glansbílæt«.

## Hvussu var tú sjálvur sum tannáringur?

Hevði eg fingið eina diagnosu, hevði hon nokk verið atferðartrupulleikar. Eg var øðiliga buldrasligur og hevði ongantíð tíð at sita stillur.

**Hvat ger ein góðan leiðara?**
At man hevur álit á starvsfólkunum og dugur at útdelegera. Og at man er tann man er. Eg haldi, at eg eri ein góður leiðari.

**Hvat ger teg illan?**
Tá fólk ikki yvirhalda avtalur og ikki hava virðing fyri hvørjum øðrum

**Hvat ger teg glaðan?**
Tá familjan hevur tað gott, og tað gongur væl í mínum arbeiði. Børnini gera meg øguliga glaðan, tað er positiv áfylling hvønn dag. Materiell ting siga mær onki.

## Hvat heldur tú vera løgið?

At samgongan situr enn, hóast teir hava gjørt so nógvar feilir.

**Hvussu er tín Gudstrúgv?**
Hon hevur stóran leiklut í mínum lívi. Eg og familjan eru virkin í samkomuni Lívdini.

**Endar man í helviti við at lurta eftir tónleiki frá samkyndum persónum?**
Hahaha ... Nei tað ger man so avgjørt ikki. Kjakið, sum hevur verið, hevur onki við veruleikan at gera.

**Hvat ert tú glaðast fyri við tær sjálvum?**
Eg eri glaður fyri mína persónligheit, mítt lyndi og mítt »drive«.

**Er tú romantiskur?**
Konan svaraði nei, tá eg spurdi hana hendan spurning, men hon legði afturat, at eg eri ein góður maður og pápi. Haldi heldur ikki sjálvur, at eg eri serliga romantiskur.

**Hvat hevði tú viljað broytt uppá í Føroyum?**
Eg hevði viljað broytt hugburðin, at onki ber til og sprænt meira jaligheit inn í fólk, sum ráða. Loyv kreativum fólki framat og gevst at hugsa um, hvat onnur halda um tað tú ger.

**Nær fær tú summarfuglar í búkin?**
Ein tíma áðrenn eg koyri stórar verkætlanir ígongd, og tá eg skal standa fram og tala.

**Er tú bangin fyri at gerast gamal?**
Slettis ikki. Tað er spennandi at gerast eldri og síggja børnini mennast. At eldast og doyggja er ein natúrligur partur av lívinum.

**Hevði tú hugsað tær at búð nakra aðrastaðni enn í Føroyum?**
Ja, eg hevði hugsað mær at búð uttanlands eina tíð – í einum heitum landi.

**Hvat hevur lívið lært teg?**
At ikki taka tað fyri givið. Liva lívið meðan man hevur tað og gera ein insats sjálvur fyri at tað skal gerast so gott sum gjørligt!